# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*»Av teimum níggju kommununum, sum vit roknaðu við í verkætlanini, hava átta eisini sagt ja, meðan tann níggjunda avgjørt ikki er avvísandi«*

*Jens Martin Knudsen*

# Innleiðandi arbeiðið er liðugt



*Tær níggju kommunurnar, sum eru við í ætlanini um fótbóltshøllina í Skálabotni eru: Runavíkar, Sjóvar, Fuglafjarðar, Funnings, Gøtu, Leirvíkar, Klaksvíkar, Sunda og Eiðis Kommuna. Hartil stendur tað Nes Kommunu í boði at verða partur av samtakinum*

**Hóast FSF ikki fekk kravda skjalatilfarið um fótbóltshøllina í Skálabotni innan 1. august, so er eingin vandi á ferð. Tíðarætlanin sigur framvegis, at høllin skal standa klár til nýtslu á heysti 2007**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá FSF í mars mánaði tók avgerð um, at FIFA-stuðulin til fótbóltshøll í Føroyum skuldi latast verkætlanini í Skálabotni, var talan ikki um eina púra treytaleysa játtan.

Eitt av krøvunum í hesi var, at fíggjar- og rakstrarætlan skuldi latast FSF innan 1. august, og í hesum skuldi eisini vera skjalprógv fyri, at talan var um eina veruleikakenda ætlan.

### Stuðulin ikki hóttur

Í dag eru vit komin til 3. august, men enn hevur FSF ikki fingið nøkur skjøl um málið frá samtakinum, sum stendur aftan fyri hallarætlanina. Hetta váttar Óli Holm, FSF-forseti, men hann sigur tó samstundis, at hetta í sjálvum sær ikki er nakað, sum koppar verkætlanini.

– Evstamarkið, sum vit settu til 1. august var fyrst og fremst eitt mark, sum FSF sjálvt hevði ásett. Talan er soleiðis ikki um, at FIFA stuðulin kann hvørva sum døgg fyri sól av hesum ávum. Eg veit eisini, at hóast einki skjalatilfar enn er komið, so hevur eitt ávíst samskifti verið millum umsitingina og fyrireikararnar av høllini, men júst hvussu langt hetta er komið, veit eg ikki at siga, sigur hann.

### Koyrir eftir ætlan

Jens Martin Knudsen er annar av høvuðsmonnunum aftan fyri verkætlanina, og hann staðfestir, at alt arbeiðið viðvíkjandi høllini koyrir eftir ætlan.

– Eg veit væl, at vit eru nakrar fáar dagar seinkaðir, men tað er slíkt, sum tíverri kann henda, tá talan er um summarfrí og annað, sum órógvar. Støðan er í løtuni tann, at skjølini sum so bara skulu hava eina undirskrift, áðrenn tey verða send FSF, so tann parturin av málinum er í lagi.

– Av teimum níggju kommununum, sum vit roknaðu við í verkætlanini, hava átta eisini sagt ja, meðan tann níggjunda avgjørt ikki er avvísandi. Og tað er ikki so, at ætlanin stendur og fellur við hesi níggjundi kommuni. Hartil er so Nes Kommuna, sum kann gerast tíggjunda kommunan í ætlanini. Tá tilfarið varð latið inn, var hetta á sín hátt í »kapping« við Svangaskarð, og tí var Nes Kommuna ikki við í tí tilfarinum. Men vit hava á ongan hátt sett toftafólk uttanfyri, so tað er eisini møguleiki fyri, at tann kommunan legst afturat, og tað ger bara ætlanina enn burðadyggari, sigur Jens Martin.

Enn sum áður staðfestir hann, at ætlanin er, at høllin stendur klár á heysti komandi ár, og tá tilfarið er latið FSF – væntandi í kvøld – er klárt at fara víðari við ætlanini, sigur hann.

## Bert ein Formula-uppgerð

Komandi vikuskiftið verður eitt av teimum heldur friðarligu í Formula-deildini. Ætlanin var annars, at fult umfar nú aftur skuldi standa á skránni, men tá neyðugt varð við broytingum – orsakað av seinkaðu steypakappingini – vórðu dystirnir hetta vikuskiftið fluttir til týskvøldið. Einasta undantakið var oddabrakið í Klaksvík, sum helst má kallast fyri fyrsti festival-dysturin í Føroyum, har vit annars eru von við stevnudystir.

Hinir fýra dystirnir verða allir spældir týskvøldið.

**-mørk**

## Póllendingur avloysir Villeneuve




Royndarkoyrarin hjá BMW Sauber, Robert Kubica verður hetta vikuskiftið fyrsti póllendingur, ið koyrir eina formil 1 koyring. Hetta tá hann avloysir Jaques Villeneuve, ið enn roynir at koma seg eftir stoytin, ið hann fekk, tá hann við rættiliga nógvari ferð rendi á ein vegg týsku formil 1 koyringini farna vikuskiftið.

Mario Theissen stjóri hjá BMW Sauber sigur við f1.com, at Jaques Villeneuve hevur boða liðnum frá, at hann ikki verður nóg birgur at koyra so stutt eftir stoytin, men Theissen leggur dent á at 21 ára gamli Kubica hevur verið sera sannførandi bæði undir royndarkoyringum og fríggjadagar fyri formil 1 koyringinarnar í ár, tí metir liðið Kubica vera rætta mannin at taka sær av hesum.

**-nud**

## FCK fekk Ajax

Við 2-2 javnleiki á útivølli móti finska MyPa vissaði danska FCK sær, at tað verða teir, sum í seinastu undankappingardystunum skulu dystat við Ajax um pláss í bólkaspælinum í Champions League. Dysturin í Parkini endaði við 2-0 sigri til FCK, og tá Fredrik Berglund eftir 12 minuttunum stútaði bóltin í finska málið, var mest sum greitt, hvør skuldi víðari. Finnar javnaður til 1-1, men við beinleiðis frísparki skoraði FCK aftur til 2-1, og so bilti tað minni, at mótstøðuliðið enn einaferð javnaði.